TING-HELLAN

# Kós Fól

TINGHELLUANALYSAN
*Bogi Eliasen*
*bogi_eliasen@hotmail.com*





## Hvat lærdu vit?

Hevði hetta fólkatingsvalið nakað nýtt við sær, sum vit ikki vistu av framanundan? Er nakað nýbrot at hóma? Kári á Rógvu vísti í seinastu Tinghellu á, vit vanliga velja mótsatt av løgtingsvalinum, og tað er okkara lyndi. Tað er eisini rætt at so er. Eitt nú í USA kemur ofta fyri, at forsetin er úr einum flokki, meðan meirilutin í kongressini er úr øðrum. Jóannes Hansen vísir á, at talið av uppstillaðum valevnum er serstakliga stórt, tá talan bert er um tveir sessir. Her sær tað út sum flokkarnir hugsa, at sterkasta flokksuppstilling gevur flestar atkvøður,og soleiðis einum í flokkinum sessin á Christiansborg.

## Øðrvísi uppstilling?

Hinvegin hava fleiri víst á, at úrslitið talar fyri at veljarin ikki bert velur ein og hvønn í flokkinum, tí landsstýrismenn, sum ongin roknar við tekur sæti á Fólkatingi, vunnu sær ikki nógvu atkvøðurnar. Tí kann tað verða nakað um tað, at flokkarnir kanska áttu at umhugsa als ikki at stilla valevnir upp, sum helst ikki fara at taka av sessinum kortini. Løgmaður Jóannes Eidesgaard valdi eina millumloysn við at vera á listanum, men greitt og erligt boða frá, at hann ikki fór at taka av sessinum, um so var at Javnarflokurin fekk tað eina sæti, og hann flestu atkvøðurnar. Fyri at avgera hvønn bógv leggjast skal á, er neyðugt at avgerða um vit vilja velja einstakar persónar, sum senatorar ella vit velja flokkar. Vist hugsar veljarin eisini um persónin, tá hann setur krossin, tó at ein partur ikki ger tað, og bert velur flokkin. Tað er eisini so, at valdi persónurin sjálvur hevur stóra ávirkan á, hvussu fólkatingssessurin verður brúktur. Við at hava floksskipan til valið, er raðfest hvør kann taka sæti, um fyrst valdi ikki kann. Við at hava flokskipanina virknað til fólkatingsvalið, hevur valda umboðið somuleiðis ábyrgd mótvegis flokki sínum, og harvið meiri rótfesti í føroysku skipanini. Ein loysn er sjálvsagt, at flokkarnir avmarka uppstillingina. Í Grønlandi vóru t.d. bert 16 valevnir, men lokalfeløgini detta burturímillum í okkara skipan, um tey einki umboð hava. Spurningurin er so, um tað ger nakað til fólkatingsvalið.

## Broytingartíð

Vallutøkan var rímiliga stór hesa ferðina, og valið nakað merkt av, at Danmark úteftir er í einari stórari broytingartíð, serliga hvat ES viðvíkur. Eg vísti sjálvur á í Tinghellugrein undan valinum, at valið í Føroyum minti mest um eitt val til eitt federalt kamar, har málini sum tikin fram vóru, snúðu seg um okkara viðurskifti úteftir, ES; uttanríkisheimildir og um møguleikarnar úteftir sum heild. Fólkatingsval í Føroyum snýr seg als ikki um vanlig innlendis mál. Sum Pauli Ellefsen vísti á í útvarpsins valsending, so bleiv so lítið at gera hjá føroysku fólkatingsumboðunum, tá so nógv málsøkir vórðu yvirtikin.

## Valið í Danmark - inneftir

Valið í Danmark var bert um Danmark inneftir. Føroyar og Grønland vórðu ikki nevnd. Men heldur ikki var ES ella Danmark úteftir við í valstríðnum, hetta hóast Danmark er partur av hersetingarvaldinum í Irak og júst hevur tikið sæti í tí mæta og valdsmikla ST trygdarráðnum sum, um nakað, gevur Danmark møguleika at styrkja sær um altjóða profilin. Men so skjótt valið var av, kom altjóða leiklutur Danmarkar á skránna í samráðingunum millum flokkarnar um kósina tey fýra komandi árini.

Sum eg royndi at vísa á í valstríðnum, tyktiskt valið í Danmark og Føroyum als ikki at vera sama val. Evnini, sum umrødd vóru, vóru ikki tey somu, endamálið við sessinum ikki tað sama, politikarar í Føroyum blivu ikki nevndir í Danmark ella øvugt.

## Danmark er Danmark

Donsku fjølmiðlarnir vístu á, at 10 flokkar stillaðu upp til fólkatingsvalið og allar kanningar eru hættaðar soleiðis at 175 sessir eru í Fólkatinginum. Sjálvt á heimasíðuni hjá Indenrigsminsteriet danska, er talan bert um 175 sessir og 10 flokkar og 103 valdømir, um hugt verður at høvuðssíðunum um valúrsliti. Talan er sostatt í Danmark um eina breiða fólksliga og fyrisitingarliga fatan av, at Danmark, eisini tá talan er um grundlógarliga Fólkatingið, bert er Danmark. Føroyar og Grønland er als ikki við í hesum spæli og ikki taldar við í kanningum og uppgerðum. Føroyar og Grønland koma bert við í hetta spælið, um teirra atkvøður kunnu gera mun, og tað gera tær ikki hesa ferð. Eg kom sjálvur í tí margháttligu støðu, at donsk fjølmiðlafólk ringdu og spurdu um valið í Føroyum. Tey skuldu hava eina grein klára, um tey norðuratlantisku umboðini gjørdust áhugaverd. Men tí tey ongantíð gjørdust annað enn ein týdningarleysur viðfáningur, fóru greinarnar í ruskspannina, áðrenn bløðini fóru til prentingar. Mín meting er, at hesi viðurskiftir stuðla undir mína niðurstøðu, at talan illa kann verða um sama val. Føroyar velur til eitt federalt kamar, meðan Danmark velur til sítt tjóðarting. Formliga er hetta sjálvsagt ikki so, men tað sum av báðum pørtum verður lagt í skipanina, tykist at undirbyggja hetta. Annað dømi er sonevnda formannsrundan, har formennirnir í donsku flokkunum taka lut beinleiðis. Men har eru eingi umboð fyri føroyskar ella grønlenskar flokkar, sjálvt um hesir flokkar hava verið, og í prinsippinum kunnu verða, avgerðandi fyri hvør stjórn kann skipast. Í Føroyum er eisini ein formannsrunda, har umboð fyri føroysku flokkarnir eru til staðar. Har verður tosað um hvussu fólkatingsumboðanin kann brúkast.

Hesi dømi eg her havi tikið fram, eru alramanna vitan, og einki slóðbrótandi í sjálvum sær, men samanlagt vísir hetta fólksligu fatanina av Fólkatinginum, at talan ikki er um eitt eindarting fyri allan ríkisfelagsskapin.

## Innlendis- og uttanríkismál

Sum sagt er tað púra greitt, at valstríðið í Føroyum snúði seg um mál úteftir. Ein kundi eisini hugsað sær at kjakið átti at havt við, hvussu ikki yvirtikin málsøkir skulu handfarast. Har var lítið konkret frammi. Stríðið í Danmark fór hvørki út um í altjóða viðurskifum, og heldur ikki út í Ríkið viðvíkjandi Føroyum og Grønlandi. Tað merkir, at hóast Fólkatingið er eindartingið í Ríkisfelagsskapinum, har Føroyar, Danmark og Grønland eru umboðaði, so sær hetta út sum ymisk val og við ymiskum flokkum.

At tað í Danmark verður løgd áherðsla á innlendismál og uttanríkismál í Føroyum, hevur ein annan trupulleika við sær. Altjóða samfelagið hevur verið undir støðugum broytingum seinastu árini og í dag er umfatandi samstarv millum lond um nærum øll málsøki, sum her verða styrkt við t.d. vitan, nýhugsan, gransking og samstarvi. Hetta hevur við sær, at tað ikki longur lættliga ber til at skilja millum uttanríkis- og innlendis politikk. Flestu málsøkir hava í dag ein uttanríkispart, sum er sera umráðandi, serliga hjá teim smærru londunum, fyri at kunna verða við í altjóðagerðini. Tað tykist eisini sum um tað er ein rímilig semja í Føroyum, at vit skulu hava størri uttanríkisheimildir á yvirtiknum málsøkjum, men hetta er heldur ikki bara sum at siga tað. Politikkur er í stóran mun ein spurningur um neyðsemjur (kompromis) og rossahandlar, har tað verður tikið og latið. Tað vil siga, at Danmark ger neyðsemjur, fyri at røkja síni áhugamál á ymsum økjum. T.d. kann Danmark slaka í málum um umhvørvi, fyri fáa ynskta semju um fríhandil. Ella fara í kríggj, fyri at fáa part av avtalum um at endurbyggja Irak, og soleiðis verða undirveitari til tað almenna USA, og kanska serliga amerikanska herin. Vilja vit røkka nakað altjóða undir verandi leisti, er tað sum partur í hesi skipan við neyðsemjum. Sum dømi kann nevnast at handilsavtalan við millum Danmark og Brasil sum læt dyrnar upp fyri føroyskum klippfiski í Brasil skuldu danir keypa kaffi úr Brasil fyri at teir lótu upp fyri klippfiskainnflutninginum, sum so kom at verða úr Føroyum.

## Samansettur eindarstatur

Danska skipanin er enn av tí fatan, at Danski Ríkisfelagsskapurin er ein samansettur eindarstatur av Danmark, Grønlandi og Føroyum. Men sum dømini í greinini vísa, so er hetta langt burtur frá fólksligu fatanini. Partarnir í ríkisfelagsskapinum virka sum tríggir, og ikki sum ein partur. Formliga eru viðurskiftini afturútsigld, tí Føroyar eru eitt valdømi, sum eigur tvey umboð í Folkatinginum, og at hesi bert telja við,